


Fráboðanir, sum ynskjast undir Innanoyggja-teigin, skulu vera blaðnum skrivliga í hendi í seinasta lagi kl. 10 dagin fyri, blaðið kemur út. Merkið brævbjálvan Tíðindi Innanoyggju og sendið hann í góðari tíð til Dimmalætting, Box 19, FR-110 Tórshavn. Í brævinum má týðuliga tilskilast, hvønn dag fráboðanin skal í blaðið. Við tað at hesi tíðindi koma í blaðið ókeypis, tekur Dimmalætting ikki ábyrgd av møguligum villum.

**Gudstænastur** septuagesima. Havnar kirkja M. Erlingsson (prædikað verður á íslendskum); Vesturkirkjan M. Bæk, talvan gongur fyri sunnudagsskúlan hjá kirkjuliga missiónsfelagnum; Argir altargangur S. Klein; Kollafjørður kl. 12 K. Mørkøre; Vestmanna kl. 12 G. Hansen; Sørvágur kl. 12 U. Næs; Sandavágur kl. 12 D. Johannesen; Norðskála kl. 11.40 skriftarmál, kl. 12 altargangur, Funningur kl. 16 barnagudstænasta E. Olsen; Rituvík kl. 11 altargangur J. Bech; Klaksvík kl. 11 altargangur N. P. Danielsen; Húsar kl. 12 altargangur H. Bøgesvang; Tvøroyri kl. 11 altargangur, Hvalba kl. 12.30 altargangur H. Poulsen.

## Suðurstreymoy

**AA-fundur** í Havn er týsdag kl. 20 á Háskúlanum og mikudag kl. 20 í Tórsgøtu 5.

**Ávík** v. Johs. Álvheygg, ráðgeva. Opið mánad.-fríggjad. kl. 10-12 og 15-17. Viðtala týsdag og hósdag kl. 20-21 á staðnum ella á tlf. 14501.

**AIDS-ráðið,** J.Paturssonargøta 24 hevur skrivstovutíð týsd. kl.16-18, tlf. 19828.

**Aqua Vitae,** Bøkjarabrekka. Hósdagin kl. 21-01 bønartænasta tlf. 10109. Telefonandaktin 11986.

**Bahá'í,** Tórshavn. Óformelt orðaskifti og upplýsing um Bahá'í er kl. 20 í Bahá'í Miðstøðini, Dj. í Geilsgøtu 19 seinasta mikudag í hvørjum mánaði.

**Eyðkvæmislinjan (AIDS)** svarar alt samdøgrið á tlf. 18820. Persónlig viðtala millum kl. 19-21 mikudag.

**Evangeliihúsið**, Tróndargøta. Telefonandaktin 12266, barnatelefonandaktin 19934.

**Felagsskrivstovan** hjá Fráhaldsrørsluni, Heygskrókur 16, Tórshavn, tlf. 16424, faks 18384, hevur opið hvønn mikudag kl. 10-13 og kl. 16-18. Opið er eisini aðrar dagar í vikuni.

**Filadelfia,** Landavegur. Í dag kl. 19 venur ungdómskórið. Mikudagin kl. 19 ungdómsrally, 9 ár og eldri.

**Frelsunarherurin,** Tórshavn. Í dag kl. 17 Club 7up, kl. 19.30 hornvenjing. Í morgin kl. 16 bøn, kl. 20 streingjakórið. Hósdagin kl. 20 Heimaforbundið. Allar kvinnur kunnu vera við.

**Færøsk-Dansk Forening,** c/o Tove Danielsen, Tórugøta 2, 100 Tórshavn. Tlf. 14531 - Telefax 19014.

**Føroyskir Radioamatørar.** OY6FRA hoyrist í dag og hvønn týsd. á repeataranum kl. 19.30. Regluligu fundirnir eru annanhvønn mikud. kl. 20 í felagshølinum Hamrabú, Yviri við Strond.

**Hvítusunnusamkoman**, Tórshavn. Í dag kl. 20 hittast kvinnurnar hjá Gerd Norðfoss, Grásteinsgøta 8.

**Immanuel,** Hoyvík. Í morgin kl. 20 verður møti.

**Javni,** Landsfelag Evnaveikum at Bata, N. Finsensgøta 32. Skrivstovan er opin mánadag kl. 10-12, mikud. og fríggjad. kl. 14-16 og hósd. kl. 14-18. Tlf. 14827 og telefax 10557.

**Katólska kirkjan.** Í morgin kl. 19.30 bindiklubbur í Mariukirkjuni. Allar kvinnur kunnu vera við.

**KFUK,** Tórshavn. Várgleði møtir í dag kl. 16. Tittlingafundurin í morgin er avlýstur.

**Kvinnuhúsfelagið** hevur limafund í KFUM í Havn hvønn 3. hósdag í mánaðinum kl. 19.

**Kvinnuhúsið** er opið gerandisdagar kl. 10.00-16.30. Tlf. 17200, svarar hvønn dag kl. 10 fp. til 7 á morgni.

**Missiónshúsið,** Landavegur. Hósdagin kl. 20 møti v. Kjartan Mørkøre.

**Pensionistafelagið** í Havn hevur bingo á Hafnia mikudagin kl. 19. Sí lýsing inni í blaðnum.

**Tórshavnar Froskmannafelag** hevur venjing í svimjihøllini hvønn mikudag kl. 20-22. Øll kunnu vera við.

## Norðstreymoy

**AA-fundir** í Vestmanna. Sunnudag kl. 17 opin fundur, hósdag kl. 20 AA-fundur. Fundirnir eru í Skótahúsinum á Heygum.

**Nardus.** Telefonandaktin er at hoyra á tlf. 21360.

**Saron,** Vestmanna. Í morgin kl. 20 bíbliutími v. Jóhan Hendrik Hansen. Hósdagin kl. 19 frítíðararbeiði. Telefonandaktin 24540.

**Tilhaldið á La Careta,** Vestmanna, fyri pensionistar og avlamin er opið hvønn hósdag kl. 15-18.

## Vágar

**Meinigheitshúsið,** Sandavágur. Í morgin kl. 20 bíbliutími.

## Eysturoy

**Missiónshúsið,** Toftir. Í dag kl. 20 verður SKA festin. Allar kvinnur kunnu vera við. Innsavnan.

**Pensionistafelagið Nón** hevur fund í dag kl. 19.30.

**Pensionistafelagið** í Skála sókn kemur saman í skúlanum í dag kl. 19.

**Sjómanskvinnuringurin** í Gøtu kemur saman hjá Juliu í morgin kl. 20. Allar kvinnur kunnu vera við.

## Norðoyggjar

**Al Anon.** Fundur fyri avvarðandi er hvønn mikudag kl. 21 í Gamla skúla í Klaksvík.

**KFUM/K,** Klaksvík. Í dag kl. 17 juniorarbeiði.

## Sandoy

**Betania,** Skopun. Í dag kl. 20 bønarmøti. Í morgin kl. 17 frítíðararbeiði fyri børnum, 7-12 ár. Tlf. andaktin 61707

**Missiónshúsið,** Skopun. Í morgin kl. 20 bíbliutími. Hósdagin kl. 20 kemur Sjómanskvinnuringurin saman.

**Zion,** Sandur. Tlf. andaktin 61707.

## Suðuroy

**Frelsunarherurin** í Vági. Mikudagin kl. 18 Junior Klub.

**Tvøroyri.** Ungdómsmøti kl. 19.30 í prestagarðinum - opið hús.

## Uttanlands

**Evangeliska Røddin,** Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Føroyingafelagið í London.** Nærri upplýsingar frá Birgit Sólstein 009 44 81 681 5730, Helgi Joensen 009 44 932 82 90 27.

## Merkisdagar

**Gullbrúdleyp.** Leygardagin 11. febr. kunnu hjúnini Dany og Jákup í Jógvansstovu, Leirvík, halda gullbrúdleyp Vælkomst verður í Missiónshúsinum kl. 19.

**Silvurbrúdleyp.** Í dag kunnu hjúnini Ragnhild og Høgni Høgnesen, Klaksvík, halda silvurbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

Í morgin 8. febr. hava hjúnini Eyðbjørg og Sjúrður Nolsøe í Dali silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Eiríksgarði. Øll eru vælkomin.

**75 ár.** Í dag 7. febr. verður Asta Johannesen, Brattabrekka 6, 75 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum, ommu- og langommubørnunum.

## Ymist

**Brævaskifti.** George Georgarakis, Hatzali Nerokokrow, GR-73100 Chania, Kreta, Grikkaland, ynskir onkran at skifta um gomul og nýggj frímerki við, telefonkort, postkort, gamlar myntir, bankaseðlar o.a.



**Flokslærarin Jørleif Kúrberg, Sankta Frans Skúli, greiðir næmingum frá arbeiðsvikuni »Herferð ímóti herverki«, sum allir skúlar í Havnini og Argja skúli takast við í hesum døgum.** *Mynd: Diml./Jens Kristian.*

# Herferð ímóti herverki

Skúlanæmingar í Havn og á Argjum hava í løtuni evnisviku, har teir fáast við ógvuliga viðkomandi evni, sum m.a. umboð fyri felagsskapir, stovnar og nevndir kunnu greiða teimum nærri frá bæði í flokshølum skúlans og á pallborðsfundum ymsa staðni í býnum hesa vikuna.

BEATE L. JENSEN

Í løtuni fer fram tiltakið, sum Tórshavnar Kommuna hevur tikið stig til, *Herferð ímóti herverki.*

Fyri líka sum at byrja á einum stað, hava Óli Rubeksen, leiðari av *Ung í Arbeiði,* og Thorben Johannesen, á Landsskúlafyrisitinginí, savnað tilfar saman, sum síðani er latið øllum skúlum í kommununi, sum í dag eisini umfatar Argja skúla.

Endamálið við tiltakinum, sum skúlarnir hava tikið undir við, við at skipa fyri eini evnisviku um *Herferð ímóti herverki* er, at økja medvitið hjá næmingum og lærarum, hvussu oyðandi harðskapur og herverk er, at tey, sum fremja hetta, gera sær greitt, hvørji sløg av harðskapi og herverki koma til sjóndar í heimi, skúla og samfelag, so næmingurin kennir hesi eyðkenni aftur.



**Tvær gentur í Sankta Frans Skúla í ferð við at rigga ymiskt til í sambandi við tiltakið »Herferð ímóti herverki«.** *Mynd: Diml./Jens Kristian.*

### At ganga væl um

Somuleiðis er endamálið við tiltakinum at fáa fram, hvørjar orsøkirnar eru til harðskap og herverk, at næmingar vinna sær hugburðin altíð at ganga væl um og bøta um umhvørvið sítt og at skapa eina gerandismentan í skúlunum, ið ikki gevur rúm ella orsøk til harðskap og herverk.

Skúlarnir byrjaðu longu í gjár arbeiði sítt, og ymiskt er, hvussu teir hava lagt arbeiðsætlanina fyri vikuna til rættis.

Í fleiri førum eru umboð fyri løgreglu, býráðsumsitingina og barnavernd biðin um at greiða frá arbeiði sínum, sum hevur við herverk at gera, saman við presti og sálarfrøðingi, tí evnið er so mikið umfatandi, at tað nemur við alt lív okkara á ein ella annan hátt.

Onkur skúli hevur heitt á handilsmenn um at greiða frá, hvussu nógv tað hevur kostað teimum, at herverk hevur verið framt á handil teirra. Ein stórur handilsgluggi í miðbýnum kostar einum handilsmanni fleiri túsund krónur fáa settan í.

### Freistingin stór

Tá herverk og harðskapur verða framd av ungfólki, slepst ikki undan, at foreldur verða drigin uppí. Tað eru jú teirra børn, ið hava verið við til hetta.

Ofta kemur skúlin uppí, tí tað kann í mongum førum vísa seg, at tað ikki gongur so væl hjá næminginum í skúlanum, kanska skulkingin versnar. Freistandi kann vera hjá honum, sum gongur fyri einki og keðir seg, at gera seg inn á okkurt.

Alt er ikki, sum tað skal vera. Tað veit næmingurin væl.

# Starvsfólk til Oljufyrisitingina

Freistin at søkja starvið sum búskaparfrøðingar á Debesartrøð var úti í gjár.

BEATE L. JENSEN

I gjár var seinasta freist at senda umsókn inn til nýggja starvið sum búskaparfrøðingur á Oljufyrisitingini á Debesartrøð.

Tað eydnaðist ikki blaðnum seinnapartin at fáa at vita, hvussu nógvar umsóknir vóru komnar inn til starvið, sum setast skal 1. apríl, tí fundur var á stovninum.

Ein av arbeiðsuppgávunum hjá búskaparfrøðinginum verður at taka lut í arbeiðinum hjá Oljuráðleggingarnevndini, kanska serliga við fyrireikingararbeiðinum viðvíkjandi búskaparligum spurningum, tá metast skal um treytir í sambandi við at leita eftir olju og útvinna olju í føroysku undirgrundini.

### Nógv ferðing uttanlands

Afturat hesum koma tær skatta- og avgjaldsteytir, sum tey eisini hava í øðrum londum, har leitað verður eftir olju, umframt tær vinnulívs- og samfelagsbúskaparligu avleiðingarnar av møguligum leitingar- og útvinningsvirksemi her í landinum.

Búskaparfrøðingurin, sum fær starvið á Oljufyrisitingini kemur at hava nógv at gera við dagliga arbeiðinum á stovninum. Hann skal hava góð samstarvsevnir og duga at arbeiða undir strangum tíðarfreistum.

Ein fyrimunir er hjá tí, sum settur verður, at hava nakað av kunnleika til oljubúskap og føroyska landsbúskapin, eins og tað er ein fyrimunur at hava arbeiðsroyndir innan fyrisiting, vinnulív ella gransking, tí arbeiðið kemur at føra nógva ferðing uttanlands við sær.

### Í stuttum sagt

● Í Thisted doyði ein 13 ára gamal drongur mikudagin. Hann var í ferð við at byggja ein stóran kavamann, sum datt omanyvir dreingin, sum kom koma at liggja undir. Drongurin spældi einamallur úti í kavanum um hetta mundið. Tað var tvíburðabróðir hansara, sum fann hann. Tá lá hann uttan vit. Hann doyði á veg til sjúkrahúsið.

# Donsku tips-úrslitini

**Tipsdystirnir í viku 5.** 4.-6. februar

| | | 1 | x | 2 |
|---|---|---|---|---|
| 1. | Coventry-Chelsea | | x | |
| 2. | Everton-Norwich | 1 | | |
| 3. | Ipswich-Crystal Palace | | | 2 |
| 4. | Leicester-West Ham | | | 2 |
| 5. | Manchester U - Aston Villa | 1 | | |
| 6. | Nottingham F - Liverpool | | x | |
| 7. | Queens Park R - Newcastle | 1 | | |
| 8. | Sheffield W - Arsenal | 1 | | |
| 9. | Southampton - Manchester C | | x | |
| 10. | Wimbledon - Leeds | | x | |
| 11. | Bolton - Wolverhampton | 1 | | |
| 12. | Derby - Sheffield U | | | 2 |
| 13. | Luton - Oldham | 1 | | |

**Forsøgn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 13 røtt: | 91.400 kr. | 11 røtt: | 218 kr. |
| 12 røtt: | 2.540 kr. | 10 røtt: | 46 kr. |

**Tipsdystirnir í viku 6.** 11.-13. februar

1. Arsenal - Leicester
2. Aston Villa - Wimbledon
3. Chelsea - Tottenham
4. Crystal Palace - Coventry
5. Leeds - Ipswich
6. Liverpool - Queens Park R
7. Manchester C - Manchester U
8. Newcastle - Nottingham F
9. Norwich - Southampton
10. Barnsley - Tranmere
11. Oldham - Middlesbrough
12. Portsmouth - Millwall
13. Reading - Derby

# Held og Lotto

**Vika 5:**

Vinnaratøl: 08 12 13 16 30 34 35

Eykatøl: 07 10 20 27

| | |
|---|---|
| 7 tøl røtt | 1.155.421 kr. |
| 6 tøl røtt + 1 eykatal | 75.483 kr. |
| 6 tøl røtt | 5.012 kr. |
| 5 tøl røtt | 195 kr. |
| 4 tøl røtt + minst 1 eykatal | 51 kr. |

Dimmalætting tekur onga ábyrgd fyri møguligum villum.

# Miðalhiti og avfall

Miðal hiti og úrgangur, mált í Tórshavn, hevur hesar seinastu dagarnar verið hesin:

| | | Miðalhiti | Úrgangur í mm |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 3.2. | 4,9 | 2,0 |
| Leygardag | 4.2. | 4,8 | 11,2 |
| Sunnudag | 5.2. | 5,3 | 2,2 |

Kelda: Danmarks Meteorologiske Institut

## DANMARKS RADIO

**Tirsdag**

| | |
|---|---|
| 11.02 | Radioavis |
| 11.30 | Kulturnyt |
| 11.55 | Det sker på P1 |
| 12.00 | Troubadourens lærling |
| 12.30 | Danmark kort |
| 12.35 | Den tyvagtige skade |
| 1.00 | På jobbet |
| 1.30 | Frikvarter |
| 1.45 | Mennesket bag... |
| 2.00 | Naboen |
| 3.00 | Børneboxen |
| 3.20 | Øremærket |
| 3.55 | Miljørapporten |
| 4.00 | Radioavis |
| 4.15 | Orientering |
| 5.15 | Markedspladsen |
| 5.25 | Nyheder fra Grønland |
| 5.30 | Radioavis |
| 5.50 | Kulturnyt |
| 6.15 | Debat om EU |
| 6.40 | Den ukendte faktor |
| 7.30 | Troubadourens lærling |
| 8.00 | Stratford |
| 8.30 | Et land har den kultur, det fortjener |
| 9.00 | Drømmen om Danmark |
| 10.00 | Radioavis |
| 10.15 | Demokratisk politik og penge i USA |

**Onsdag**

| | |
|---|---|
| 11.02 | Radioavis |
| 11.30 | Kulturnyt |
| 11.55 | Det sker på P1 |
| 12.00 | Troubadourens lærling |
| 12.30 | Danmark kort |
| 12.35 | Den tyvagtige skade |
| 1.00 | Panorama |
| 1.20 | Korn, køer og kendsgerninger |
| 1.40 | Social brevkasse |
| 2.00 | Studie 2000 |
| 3.00 | Børneboxen |
| 3.20 | Øremærket |
| 3.55 | Miljørapporten |
| 4.00 | Radioavis |
| 4.15 | Orientering |
| 5.15 | Markedspladsen |
| 5.25 | Nyheder fra Grønland |
| 5.30 | Radioavis |
| 5.50 | Kulturnyt |
| 6.15 | Adam og Christiane |
| 7.15 | Weilbach |
| 7.30 | Troubadourens lærling |
| 8.00 | Skanderborg Station |
| 9.00 | Sprog |
| 10.00 | Radioavis |
| 10.15 | Det nye Europa |

Herefter fælles med P3

## Hini gjaldoyruni

6. februar 1995

| | | |
|---|---|---|
| New York | USD | 602,90 |
| London | GBP | 940,82 |
| Frankfurt | DEM | 394,56 |
| Stockholm | SEK | 80,70 |
| Oslo | NOK | 90,17 |
| Paris | FRF | 113,88 |
| Bruxelles | BFR | 19,186 |
| Zürich | CHF | 465,86 |
| Amsterdam | NLG | 352,02 |
| Roma | ITL | 0,3748 |
| Helsinki | FIM | 127,73 |
| Reykjavík | ISK | 9,92 |
| Wien | ATS | 56,107 |
| Madrid | ESP | 4,551 |
| Lissabon | PTE | 3,824 |
| Montreal | CAD | 430,74 |
| Tokyo | JPY | 6,0656 |
| Ecu | ECU | 743,77 |
| Athen | GDR | 2,555 |
| Dublin | IEP | 933,40 |

Kelda: Føroya Banki